# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Heimsin harðasta ítróttagrein verður triathlon rópt. Og hóast talan bert er um 1/4 ironman, so eru hálvur annar kilometur í vatni, 40 á súkkul og 10 á fótunum helst í meira lagi hjá teimum flestu*

# Triathlon á nýggjari rutu

**FM í Triathlon verður sunnudagin. Hesu ferð verður kappast á sokallaða OL-teininum**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin 21. september klokkan 13 verður kappast um FM heitið í Triathlon. Fyri trimum vikum síðan bleiv kappast í tí sokallaða Sprint teininum, ið er 750 metrar svimjing, 20 km súkkling og 6 km renning. Nú verður kappast á tí sokallaða OL teininum. Luttakararnir skulu fyrst svimja 1,5 km, síðan súkkla 40 km og at enda renna 10 km.

### Súkkla í býnum

Í nógv ár hevur súkkluteinurin verið frá Tórshavn til Kaldbak og so aftur til Tórshavn. Ein góður teinur, men fyrireikarnir ynskja nú at fáa sjálva kappingina inn í býin og tú verður súkklurutan umløgd.

Nýggja súkklurutan verður frá Svimjihylinum í Gundadali, oman til rundkoyringina við Skansan. Leiðin gongur síðan niðan til rundkoyringina við Hvítanesvegin, og síðan til rundkoyringina við R. C. Effersøesgøtu. Hesin teinur er umleið 10 km, og skal tí súkklast fýra ferðir.

Renningin verður á økinum kring Plantusøluna við Hvítanesvegin. Ein teinur á umleið 3 km skal rennast tríggjar ferðir. Málið verður við perkeringsøkið hjá Plantusøluni.

Gudmund Joensen er besta boð at vinna kappingina hjá monnum. Í juni mánað í ár megnaði Gudmund at gjøgnumføra OL teinin uppá 2 tímar og 6 minuttir. Málið hjá Gudmund er at koma undir 2 tímar, og viðrar næsta sunnudag, so er møguleiki hjá honum at seta nýtt føroyskt met. Fyriskipararnir av FM í triathlon vóna sjálvandi at Joan Bláfoss og Karina Ottosen leggja leiðina til Føroya næsta vikuskifti, fyri at luttaka í kappingini um FM-heitið. Verður Joan við, er hon allarhelst favorittur at vinna kappingina hjá kvinnum.

### Liðkapping og 1/10 triathlon

Fyri at økja um áhugan fyri triathlon hevur Føroya Triathlon Felag avgjørt eisini at kappast í triathlon fyri lið og í einum 1/10-triathlon fyri einstaklingar.

Liðkappingin er skipað soleiðis, at ein íðkari svimur, ein súkklar og ein rennur. Eitt slag av stafett, kann ein siga. Tilsamans skulu hesi svimja 750 metrar, súkkla 20 km og renna 6 km.

Fólk, ið ætla at royna triathlon og ikki ynskja at kappast í fleiri tímar, hava møguleika at kappast í 1/10-triathlon. Her skal íðkarin svimja 400 metrar, súkkla 10 km og renna 3 km. FTF hevur fyrr skipað fyri triathlon á hesum teini, og tá hevur undirtøkan verið heilt góð, bæði millum ung og tilkomin.

Liðkappingin verður millum menn, kvinnur og mixlið. Virkir og ítróttarfelag eru vælkomin at luttaka.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni hjá Føroya Triathlon Felag, www.triathlon.fo.

## Eitt lið av venjararum

**10 av teimum, sum spældu við besta liðnum hjá HB í 1992-93, hava seinni gjørt vart við seg á síðulinjuni**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað vísir seg ofta, at fótbóltsleikarar hava torført við at sleppa spælinum, og seinni royna seg sum venjarar. Tað eru nakrir av teimum, sum umboðaðu HB í árunum 1992 og 1993 góð dømi um. Heili 10 teirra hava seinnu árini roynt seg í venjarastarvinum.

40 ára gamli Jens Erik Rasmussen er framvegis virkin sum leikari. Í 2003 stóð hann á odda fyri FS Vágum, sum sama árið flutti niður í næstbestu deildina. Kári Reynheim hevur verið venjari hjá B71 og Fram, meðan Jan Dam í fjør var nær við at lyfta FS Vágar 2004 í bestu deildina.

Sverri Jacobsen var høvuðsvenjari hjá HB í bæði 1992 og 1993.

Hesir 10 hava roynt seg sum venjarar. (í klombrum er viðmerkt, hvør leiklutur teirra er innan fótbólt í dag):

Jóannes Jakobsen (fótbóltsviðmerkjari)
Kári Nielsen (hjálparavenjari hjá B36)
Rúni Nolsøe (venjari hjá HB)
Jan Dam (ikki virkin í fótbólti)
Kári Reynheim (ikki virkin í fótbólti)
Sámal Erik Hentze (hjálparavenjari hjá HB)
Sigfríður Clementsen (venjari hjá EB/Streymi)
Heðin Askham (venjari hjá B36)
Jens Erik Rasmussen (spælir við 07 Vestur)
Julian Johnsson (spælir við Svendborg fB)



*Rúni Nolsøe var partur av HB-liðnum í 1992-93. Saman við níggju øðrum hevur hann seinni roynt seg í venjarastarvinum*